

# Leyst starv í Tórshavnar kommunu

**Reingerðarfólk til Býlingshúsið millum Gilja**

Søkt verður eftir einum reingerðsfólki at arbeiða 2 tímar um dagin, eftir kl. 17.15, at byrja 3. mars 2008 ella eftir nærri avtalu.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður lønt sambært sáttmála við avvarandi yrkisfelag.

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Býlingshúsinum millum Gilja, Postboks 3165, 188 Hoyvík í hendi seinasta lagi fríggjadagin 22. februar 2008.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Jónu Guttesen, stovnsleiðara, telefon 31 83 72 ella 27 25 45.

**Lesið meira um onnur størv á www.torshavn.fo**

Tórshavnar kommuna

Starvslýsing

Stuðulstænastan

## Stuðlar til Stuðulstoymið í Suðurstreymoy

Søkt verður eftir 2 stuðlum til Stuðulstoymið í Suðurstreymoy. Ein til at arbeiða 40 tímar um vikuna og ein fastan avloysara 30 tímar um vikuna.

Stuðulstænastan hevur til endamáls at veita sosialpedagogiska hjálp, fylgi, eftiransan og umsorgan til brúkarar um alt landið.

**Stuðulstænastan kann bjóða:**
- Eitt spennandi arbeiðspláss við møguleikum fyri persónligari og fakligari menning
- Ein virknan tvørfakligan starvsfólkahóp
- Samávirkan á gerandis uppgávur
- Kunning í arbeiðinum og supervision

**Lønar- og setunartreytir:**
Talan er um føst størv innan Nærverkið og roknast má við, at arbeiðstíðirnar av og á eru skiftandi, dag-, kvøld-, og vikuskiftisarbeiði. Løn sambært avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Fleiri upplýsingar um starvið eru at fáa hjá økisleiðaranum Odu Jóhansdóttir, tlf. 554021 og deildarleiðaranum Regin Johansen, tlf. 360000.

Starvið verður sett 15.03.2008 ella skjótast aftaná.

Umsóknir skulu sendast til:

Nærverkið
Stuðulstænastan
stílað.: Regin Johansen
Argjavegur 26
160 Argir

**Umsóknarfreist: 1. mars 2008.**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 36 00 00 · Faks 36 00 01 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo



Skeiðsdepilin

FØROYA HANDILSSKÚLI · TEKNISKI SKÚLIN

Grundskeið í
# Sveising
**á Tekniska Skúla, Tórshavn**

**10.-14. mars 2008, kl. 08.10-15.25, 40 tímar**

**Ein kønur sveisari er serfrøðingur á økinum**
Skeiðið er ætlað teimum, ið ikki hava roynt at sveisa áður, men hava áhuga innan hetta yrki.

**Skeiðið umfatar:**
Luttakarin arbeiðir við einføldum sveisistøðum við elektrodu, gass, TIG, MIG/MAG sveisiháttum.
Roynt verður at koma so vítt sum tilber, og møguleiki verður at leggja seg eftir ávísum sveisihátti.

**Pláss er fyri 11 luttakarum**

| | |
|---|---|
| **Stað:** | Tekniski skúli, Smiðjugerði |
| **Kostnaður:** | 9.000,- kr. íroknað tilfar og mat |
| **Tilmeldingarfreist:** | áðrenn 25. februar ella so leingi pláss er. |

SENDISTOVAN

Marknagilsvegur 75, Postrúm 3239, 110 Tórshavn
tel 318813, Fax 313374, info@skeidsdepilin.fo, www.skeidsdepilin.fo